

LÍV søkir eftir

# avloysara til bókhaldsarbeiði

at byrja skjótast gjørligt.

**Starvsøkið**
Sum avloysari á fíggjar- og roknskapardeildini verður tú partur av bókhaldstoyminum og kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við onnur á deildini. Starvið er tíðaravmarkað til 31. mai 2011.

**Um teg**
Vit vænta, at tú hevur eitt sjálvstøðugt arbeiðslag, ert íðin, hevur góð samstarvsevni og dugir væl at samstarva og at arbeiða í bólki. Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving ella royndir.

**Umsóknir og umsóknarfreist**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og øðrum skjølum kunnu sendast við teldubrævi til atli@liv.fo ella við vanligum brævi til:

LÍV
Starvsfólkadeildin
Kopargøta 1
Postsmoga 206
110 Tórshavn

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. september.

**Meira at vita?**
Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Eyðnu Justinussen, fíggjarleiðara, á telefon 21 95 75 ella á eydna@liv.fo.

Kopargøta 1
P.O. Box 206
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tlf. +298 31 11 11
Fax +298 35 11 10
www.liv.fo

LÍV er største veitari av lívs- og eftirlønartryggingum til fakfeløg og virkir.

SENDISTOVAN



Klaksvíkar Kommuna I Dagrøktarskipanin



# DAGRØKTARLEIÐARI

**Klaksvíkar Kommuna søkir eftir dagrøktarleiðara til kommunalu dagrøktarskipanina. Í løtuni sær skipanin soleiðis út: 60 børn í aldrinum 0-3 ár, 17 dagrøktarar, 1 hjálparfólk í spælistovuni og 1 námsfrøðingur 30 t/viku. Leiðarin hevur starvsstað í Spælistovuni, á Brekku 36. Barnatalið skiftir eftir ansingartørvinum í kommununi.**

**Vit kunnu bjóða:**
- Eina skipan við góðum karmum
- Starvsfólk við royndum og sum brenna fyri sínum arbeiði
- Tætt samstarv við kommunalu umsitingina
- Góðar starvsfelagar í leiðarabólkinum

**Arbeiðsuppgávur:**
- Hevur dagligu leiðsluna og ábyrgdina av skipanini innanfyri ásettu karmar
- Skal góðkenna dagrøktaran og heimið og hava yvirskipað eftirlit við, at børnini trívast og mennast
- Veitir ráðgeving og vegleiðing til dagrøktarar og foreldur í námsfrøðiligum og uppalingarligum spurningum
- Skipar fyri starvsfólkafundum, foreldrafundum og øðrum felagsvirksemi
- Hevur tað umsitingarliga um hendi, so sum fíggjarætlan, lønir, inngjal ingar, innliman av børnum o.a.
- Keypir inn og útflýggjar tað, ið neyðugt er
- Fylgir við og skipar so fyri, at fyriskrivaðar reglur verða fylgdar

**Fakligir førleikar:**
- Tú hevur útbúgving sum námsfrøðingur
- Tú ert hugað/-ur at arbeiða við leiðslu sum arbeiði
- Tú hevur hegni til tann umsitingarliga partin og telduførleika
- Tú dugir væl at orða teg í skrift og talu á føroyskum

**Persónligir eginleikar:**
- Tú ert før/-ur fyri at ganga á odda
- Tú hevur gott yvirlit
- Tú leggur dent á góðan kvalitet og á høgt fakligt støði
- Tú ert kveikjandi og før/-ur fyri at geva íblástur til starvsfólkið
- Tú hugsar um heildina og samstundis gevur pláss fyri ymiskleikum
- Tú hevur góð samstarvs- og samskiftisevnir

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er at seta frá 1. november 2010. Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag. Starvið er flokkað frá lønarstigi 26 til 32.

Skrivlig umsókn saman við prógvi og viðmælum skal sendast til **Klaksvíkar Kommuna, Nólsoyar Pálsgøta 32, 700 Klaksvík.**
Umsóknarfreistin er **mánadagin 11. oktober kl. 12.00.**

Meira fæst at vita við at venda sær til Vivian Bjartalíð, virkandi leiðara, á tel. 456385 ella Sigrun Vágstún, samskipara á tel. 41 00 24.

Klaksvíkar Kommuna I Nólsoyar Pálsgøta 32 I FO-700 Klaksvík I Tel. 410000 I Fax. 410001 I klaksvik@klaksvik.fo I www.klaksvik.fo